## Bersøgin prestur

Søren Krarup, fólkatingsmaður hjá Danska Fólkaflokkinum, er eisini prestur, men tað hoyrist sjáldan á orðalagnum, tá hann tekur orðið í Fólkatinginum. So var heldur ikki í dag, tá hann samanbar halgubók hjá muslimunum, Koranina, við bøkurnar "Mein Kampf" hjá Adolf Hitler og "Das Kapital" hjá Karl Marx. Søren Krarup segði, at Koranin kann samanberast við hinar báðar, tí eins og tær byggir hon á ein sannleika.

## Tollarar á floti

Teir seinastu dagarnar hevur norska tollverkið lagt seg eftir at kanna stuttleikabátar, sum koma aftur eftir at hava verið svensku megin markið og keypt sterkt. Soleiðis var t. d. seinasta sunnudag, tá tollbátar steðgaðu 28 stuttleikabátum í Oslofjørðinum. Tólv teirra vórðu kannaðir út kjølinum upp í mastrina, men bara tríggir vvístu seg at hava keypt meiri, enn loyvt er. Tað loysti seg heldur ikki, tí teir fingu næstan 9.000 krónur í bót.

Vindorka í Nólsoy:

# Verkætlanarbólkur stovnaður

**Sonevnda Nólsoyarætlanin fer nú inn í eitt nýtt skeið. Eftir samráðingar við útlendskar fyritøkur er skipaður ein bólkur við bæði útlendskum og lokalum kreftum, sum skal arbeiða víðari við ætlanunum**

ORKA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fyri góðum ári síðani var so smátt farið undir tað, sum vanliga verður nevnt Nólsoyarverkætlanin. Henda ætlan snýr seg í stuttum um, at gera eina royndarverkætlan, har Nólsoy verður sjálvforsýnandi við varandi orku.

Hetta skal gerast við at seta vindmyllur upp í oynni, sum síðani skulu framleiða streym og hita til húsarhaldini. Avlopið skal gerast um til vetni, sum skal vera til at taka, tá ov lítil vindur er at framleiða streym.

Vindmátingar hava verið gjørdar í eitt gott ár, men hesar kanningar skulu halda fram í eina tíð enn. Higartil hevur tað fyrst og fremst verið Jarðfeingi, sum saman við áhugafelagnum Nólsoyar Orkufelag, hava verið tengt at verkætlanini, men meiningin hevur alla tíðina verið at fingið vinnuligar aktørar við í myndina, ikki minst fíggjarliga.

Og nú er hetta málið nátt.

### Útlendsk feløg

Jarðfeingi hevur havt samráðingar við útlendsk feløg, og nú er so ein verkætlanarbólkur settur á stovn. Umframt lokalar kreftir umfatar bólkurin Norsk Hydro, Statoil og týsku vindmyllufyritøkuna Enercon.

Hesin bólkurin skal standa fyri víðari kanningum við tí endamáli, at lýsa tøkniligu- og vinnuligu møguleikarnar umframt umhvørvið í sambandi við royndarverki í Nólsoy.

Landsstýrismaðurin í Vinnumálum er sjálvur ógvuliga áhugaður í verkætlanini um Nólsoy sum grøna oyggj, og hann vil á ongan hátt undirmeta tann týdning, hendan verkætlanin kann fáa.

Týdningurin av Nólsoyarverkætlanini kann ikki yvirmetast. Eydnast ætlanin væl, kann hon gerast ein fyrimynd fyri bæði okkum her heima í Føroyum, og fyri alheimssamfelagið sum heild, tí talan er um varandi orku, ið fer sera væl við umhvørvinum, sigur Bjarni Djurholm.



*Bjarni Djurholm hevur nú sett á stovn ein verkætlanarbólk, ið skal arbeiða víðari við sonevndu Nólsoyarverkætlanini.*

Lógin um yvirtøku av fólkakirkjuni:

# Limaskapur í fólkakirkjuni ikki kravdur

**Eitt notat, sum løgtingsskrivstovan hevur gjørt til Mentanarnevndina í sambandi við uppskot um lóg um fólkakirkjuna sigur, at tað stríðir ímóti Stýrisskipanarlógini at krevja, at landsstýrismaðurin í kirkjumálum ella løgmaður eru limur í fólkakirkjuni**

FÓLKAKIRKJAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nú lógin um yvirtøku av fólkakirkjuni er fyri á løgtingi, er ein ógvuliga viðkomandi og nógv umrøddur spurningur, um landsstýrismaðurin í kirkjumálum skal vera limur í fólkakirkjuni.

Fyri nógv er tað helst heilt náttúrligt, at so er, men sambært einum notati, sum løgtingsskrivstovan hevur gjørt til Mentanarnevndina, ber ikki til at krevja, at landsstýrismaðurin í kirkjumálum er limur í fólkakirkjuni. Hetta er nevniliga í stríð við Stýrisskipanarlógina.

Tað man kortini ikki koma óvart á tey flestu, tí, sum vit vita, eru vit í dag júst í terri støðu, at sitandi landsstýrismaður í kirkjumálum, Jógvan á Lakjuni, er limur í Brøðrasamkomuni, og ikki í fólkakirkjuni.

Eitt annað mál í hesum sambandi, sum hevur verið nógv umrøtt, er, hvør skal hava hægstu yvirvøld fólkakirkjunnar, tá hon er komin á føroyskar hendur. Sum støðan er, er drotningin hægsta yvirvøld fólkakirkjunnar, men tá kirkjan er yvirtikin, verður hetta ikki longur ein møguleiki.

So tað áhugaverda er, hvør tekur yvir leiklutin hjá drotningini, tá kirkjan kemur á føroyskar hendur.

### Kann vera ateist

Og svarið til hendan spurningin er púra greitt. Tað verður løgmaður. Hetta verður eisini staðfest í viðmerkingunum til uppskotið um føroyska fólkakirkju.

Tá ein yvirtøka verður framd, so verða tær fylgjur og tær ábyrgdir, sum liggja á danska ráðharranum av sær sjálvum fluttar á tilsvarandi føroyska landsstýrismannin. Sama er galdandi við teimum fylgjum og ábyrgdum, sum áliggja drotningini, tær verða av sær sjálvum fluttar yvir á løgmann.

Og tað er ógvuliga áhugavert, tí einasti persónur í danska ríkinum, sum ikki hevur trúarfrælsi, er drotningin. Tað merkir samstundis, at eingin kann krevja, at løgmaður er limur í fólkakirkjuni. Teoretiskt kann løgmaður enntá vera ateist, og framvegis vera hægsta yvirvøld fólkakirkjunnar.

Í lógaruppskotinum um føroyska fólkakirkju verður tó mælt til, at um løgmaður ikki er limur í fólkakirkjuni, verða ásetingarnar um hægstu yvirvøld fólkakirkjunnar latnar varaløgmanni.

Einki er at ivast í, at hetta mál fær drúgva umrøðu í sambandi við yvirtøkuna av fólkakirkjuni.



*Jóannes Eidesgaard, løgmaður, fær hægstu yvirvøld fólkakirkjunnar, tá hon verður yvirtikin. Teoretiskt kann løgmaður vera ateist, og framvegis vera hægsta yvirvøld fólkakirkjunnar*